## Sjálvstýrið nýggjan samleika

Grønlendska sjálvstýrið skal hava ein nýggjan grafiskan samleika, sum skal vísa, at landið er ikki eitt heimastýri longur. Tann nýggi grafiski samleikin skal brúkast á heimasíðuni hjá sjálvstýrinum, og hann skal eisini prýða bravpappírið og allar faldarar hjá myndugleikunum. Ein tann største broytingin er, at orðini „Grønlands Selvstyre" hvørva og við tí eisini allur tann danski teksturin. Í framtíðini verða øll hugtøkini á grønlendskum og enskum máli. Tað merkir millum annað, at ístaðin fyri „Landsstyret" fer at standa „Naalakkersuisut" og „Government of Greenland", sigur kringvarpið KNR.



## Enn størri arbeiðsloysi

Forsagnir hjá íslendska Seðlabankanum vísa, at arbeiðsloysið í Íslandi er ikki komið í hæddina enn, og at tað fer at sta nda við í rættiliga rúma tíð afturat. Forsagnirnar siga, at í fyrsta ársfjórðingi næsta ár verður arbeiðsloysið góð 10 prosent, og at tað fer at liggja millum 9 og 10 prosent líka til annan ársfjórðing í 2011. Síðani fer tað at minka spakuliga. Morgunblaðið skrivar, at forsøgnin hjá Seðlabankanum er eitt sindur meiri bjartskygd enn ein forsøgn, sum bankin gjørdi í august. Tá væntaði bankin, at arbeiðsloysið fór at liggja um 11 prosent annan ársfjórðing næsta ár.

# Spyrja í vest - svara í eyst

**Tá løgtingsmaður spyr í eyst, kemur svarið hjá landsstýrismanni úr vest. Hetta kann í stuttum sigast um svarið, ið løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, fekk frá landsstýrismanninum, Jóhan Dahl, tá spurt varð um viðurskiftini hjá fiskimonnum í Arbeiðsloysisskipanini**

ALS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jóhan Dahl, landsstýrismaður, sigur seg einki kenna til, at sjófólk, sum annars lúka krøvini fyri at fáa útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini, hava trupulleikar við at fáa pening haðani.

Hetta sigur hann í stuttum svari til munnliga fyrispurningin hjá løgtingsmanninum, Kára P. Højgaard.

Tá løgtingsmaðurin í øðrum lagi spurdi landsstýrismannin, um sjófólk hava fingið nóg neyva kunning um broyttu treytirnar fyri útgjaldi úr ALS, vísti Jóhan Dahl á, at Arbeiðsloysisskipanin hevði fund við formannin í Fiskimannafelagnum beint eftir, at nýggja kunngerðin varð sett í gildi tíðliga í heyst – og á hesum fundi varð kunnað um skipanina.



*Í stuttari viðmerking, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, at hann ikki er vorðin stórt klókari eftir svarið hjá landsstýrismanninum, Jóhan Dahl*

- Annars hava fiskimenn, sum ynskja neyvari kunning, møguleika at fara inn á heimasíðuna hjá ALS, og í øðrum lagi kunnu teir eisini venda sær til Arbeiðsloysisskipanina, segði landsstýrismaðurin.

### Einki svar

Kári P. Højgaard spurdi eisini, um politiska skipanin hevur viðgjørt spurningin, um fiskimenn og sjófólk kanska kundu havt sína egnu tryggingarskipan.

Men her kunnu vit siga, at tá løgtingsmaðurin spyr í eyst, svarar landsstýrismaðurin í vest, tí svarið hjá Jóhan Dahl viðger ikki møguleikarnar fyri eini nýggjari skipan fyri fiskimenn og sjófólk.

Landsstýrismaðurin vísir í sinum svari á, at galdandi reglurnar í ALS, sum eru fyri fiskimenn og sjófólk, hava fingið sína politisku viðgerð, tá broytingarnar vóru til viðgerðar og vórðu samtyktar á løgtingi.

- Eg havi síðan sett nærri reglur í gildi við kunngerð, og tá hevur eftir vanligu mannagongdini verið kunnað um kunngerðina á landsstýrisfundi, áðrenn hon varð sett í gildi, sigur Jóhan Dahl, landsstýrismaður, í sínum svari.

Soleiðis kunnu vit siga, at landsstýrismaðurin ikki svarar spurninginum hjá Kára P. Højgaard, um landsstýrið hevur viðgjørt møguleikarnar fyri einari aðrari skipan fyri fiskimenn og sjófólk.



*Jóhan Dahl, landsstýrismaður, sigur seg einki kenna til, at fiskimenn og sjófólk ikki fáa tað útgjald úr ALS, sum nýggju reglurnar geva teimum rættindi til*

*Mynd: Karstin Vang*

# Gongur illa at fáa úr ALS

**- Broytingarnar, sum løgtingið tíðliga í summar samtykti í lógini um Arbeiðsloysistrygging, hava lítlan og ongan mun gjørt. Eg vil siga, at tann bati, vit væntaðu og vónaðu, slett ikki hevur virkað í praksis fyri fiskimenn og sjófólk, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum**

ALS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Svarið, sum landsstýrismaðurin, Jóhan Dahl, hevur givið Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, sum spurdi, hvussu gongur hjá fiskimonnum og sjófólki at fáa útgjald úr ALS, undrar ikki so lítið formannin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard.

- Tað gongur illa hjá okkara limum at fáa útgjald, tá tørvur er á útgjaldi fyri mista inntøku. Eg haldi, at broytingarnar, sum samtyktar vórðu tíðliga í summar, eru uppblástar á tann hátt, at tær lítla og onga ávirkan hava havt á útgjaldsmøguleikarnar hjá okkara limum.

Jan Højgaard heldur, at treytirnar, sum ALS setir í praksis, eru ov harðar, og tí fella nógvir fiskimenn framvegis uttan fyri í verandi skipan.

- Nei, hetta er slett ikki nóg gott sum er, og eg veit ikki, hví fiskimenn og sjófólk skulu viðfarast so nógv øðrvísi enn aðrir borgarar í samfelagnum.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum vísir á, at skulu fiskimenn og sjófólk fáa útgald eftir nýggju skipanini og lýstu kunngerð landsstýrismanna, skulu váttanir fyriliggja.

- Sjálvandi skulu váttanir fyriliggja, men váttanir skulu valdast. Í summum førum skulu váttanir fyriliggja, bæði frá reiðara og eitt nú bedingini, har skipið er – og viðhvørt skulu so aftur nýggjar váttanir til fyri, at fólk skulu fáa síni rættindi.

Jan Højgaard heldur ikki, at broytta lógin og seinni lýsta kunngerðin gera umstøðurnar hjá sjófólki og fiskimonnum í ALS nóg góðar.

- Skipanin tryggjar ikki nóg stóran mun okkara limir, sum á ymiskan hátt detta niður ímillum í skipanini, sigur Jan Højgaard.

## SøluRás á Skála í vikuskiftinum

**Afturvendandi og væl vitjaða sølustevnan á Skála, SøluRásin, sum hon verður rópt, verður í vikuskiftinum í ítróttarhøllini á Skála**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað eru feløgini, Skála Ítróttarfelag, Skála Róðrarfelag, StÍF og Strálan, sum skipa fyri.

Hetta er ein sølustevna, sum gjøgnum árini hevur verið sera væl vitjað, og aftur í ár er høllin fullsett við framsýnarum.

### Nógv undirhald

Bæði leygardagin og sunnudagin, tá stevnan er, verður undirhald.

Úr rúgvuni av tiltøkum nevna fyrireikararnir, at leygardagin verður gyklarin Asbjørn og Freki Finn, og seinni koma Juliannu Boys og country kongurin, Hallur Joensen og vinir at undirhalda.

Sunnudagin verður eisini ymiskt til undirhalds á skránni.

Lisa Frederiksberg fer at syngja saman við øðrum, og stórt vørutombola verður uppi í bygdasalinum.

Seinni á degnum kemur Trøllafamiljan at vitja, og Jens Marni Hansen kemur á pallin at syngja.

- Umframt alt hetta verða tvær mótasýningar hvønn dagin, siga fyrireikararnir.

### Stórir vinningar

Tað síðsta, sum hendir hvørt kvøldið, er, at trekt verður á pallinum um ymiskar vinningar millum seld atgongumerki fyri dagin, har høvuðsvinningar eru tveir kekkar á 5000 krónur, har trekt verður millum øll seld atgongumerki fyri báðar dagarnar.

Av Skála verður sagt, at fólk eru væl komin á vitjan, nú SøluRásin verður í vikuskiftinum – í morgin